# Innlating : Trigonometri, algebra, miðalferð & kursur

## 1. Trigonometri I

**Ein tríkantur hevur mátini:**




**a) Rokna síðu b**

**b) Rokna vinkul |∠ C |**

**c) Rokna síðu c**

**d) Rokna víddina á tríkantinum**

## 2. Trigonometri II

**Í tríkantinum DEF er |∠ E = 75° | og |∠ F = 50° | og DE = 5,5 cm**

a) **Rokna vinkul |∠ D |**
b) **Rokna |DF|**
c) **Rokna |EF|**
d) **Rokna víddina á tríkantinum DEF**

# 3. Algebra:

**Umstytt**

a) **$8(2x - 3) -4(3 + 4x)$**
b) **$x(2x - 3) -4(x + 2 - 3x)$**
c) **$x^2 + x(8 - x) + (2x-4)^2$**
d) **$2(-a - 2) + (a + 2)^2$**

**Loys líkningaheildina**

a) **$y= -\frac{1}{2}x + 4$ og $y - x = - 2$**
b) **$y = -2x + 8$ og $y -2x = -4$**

# 4. Miðalferð:

**Hanna og familjan fóru til Mallorka. Tey flugu beinleiðis úr Føroyum til Mallorka. Teinurin úr Føroyum til Mallorka er 2695 km, og miðalferðin hjá flogfarinum er 770 km/t.**

a) **Hvussu langa tíð tók tað at flúgva teinin?**

**Flogfarið brennur í miðal 2600 litrar av brennievni um tíman.**

b) **Hvussu nógvar litrar av brennievni brennur flogfarið úr Føroyum til Mallorka?**

**Á ferðini úr Føroym millumlendi flogfarið í Glasgow. Ferðin úr Føroyum til Glasgow vardi í 48 minuttir.**

c) **Hvussu langt er úr Føroyum til Glasgow?**

# 5. Kursur:

**Á Mallorka brúka tey gjaldoyrað Evru. Kursurin á evruni var 743,56.**

**Hanna og tey høvdu Visa-kort við sær á ferð til Mallorka. Tey kundu veksla í gjaldoyrasjálvtøkum, men kundu bara veksla í mesta lagi fyri 2000 kr um dagin.**

a) **Hvussu nógvar evrur kundu tey í mesta lagi fáa um dagin (minsti mynturin í hesum sjálvtøkum er 20 evrur)?**

**Tá ið tey komu heimaftur, høvdu tey 150 evrur við sær, og tær vekslaðu tey til føroyskar krónur.**

b) **Hvussu nógvar krónur fingu tey fyri evrurnar?**